## DNA á knívinum

Fyribilskanningar, sum rannsóknarstovan Forensic Science Service í Birmingham í Onglandi hevur gjørt, hava staðfest DNA frá tí 24 ára gamla varðhaldsfongslaða manninum uppi á knívinum, sum svenski uttanríkisráðharrin,Anna Lindh, varð myrd við.

Tað skrivar svenska blaðið Expressen. Blaðið sigur seg hava fingið at vita frá vælvitandi keldum, at enska fyribilsúrslitið gevur eina greiða ábending um, at tann 24 ára gamli maðurin, Mijailo Mijailovic, hevur havt knívin í hondini. Knívurin, sum Anna Lindh varð stungin við, varð funnin við eina rullitrappu í handilshúsinum NK.

Tann 24 ára gamli maðurin noktar seg sekan. Fyrradagin var hann til eina sálarliga kanning.

## SAS næstu ferð

Avgerðin hjá franska Air France og niðurlendska KLM at leggja saman kann vera byrjanin til, at fleiri flogfeløg í Evropa verða løgd saman í nøkur fá stór feløg.

Svenski íløguserfrøðingurin Ragnhild Wiborg væntar, at um stutta tíð verða trý stór flogfeløg í Evropa. Nú Air France og KLM hava gjørt av at leggja saman, væntar hon, at tað týska Lufthansa og tað norðurlendska SAS fara at leggja saman í eitt felag, og tað triðja stóra flogfelagið verður so Biritsh Airways, sigur Ragnhild Wiborg.

Keldur í SAS ivast í spádóminum hjá svenska íløguserfrøðinginum. Tær siga, at samanleggingin hjá Air France og KLM fær lítla og onga ávirkan á viðurskiftini hjá SAS. Norðurlendska felagið hevur eina samstarvsavtalu við Lufthansa, og hon virkar so mikið væl, at tað er eingin grund til at leggja feløgini saman, siga keldurnar. Men Ragnhild Wiborg er ikki samd við teimum. Ein samstarvsavtala er ikki nóg mikið í framtíðini, sigur hon, og tí verða Lufthansa og SAS løgd saman fyrri ella seinni, sigur Ragnhild Wiborg við Dagens Industri.

## Gentur ætlaðu yvirgang

Myndugleikarnir í Marokko vilja vera við, at tríggjar 14 ára gamlar gentur høvdu lagt ætlan um eina yvirgangsatsókn inni í einum stórhandli í býnum Rabat. Ein av gentunum skuldi spreingja seg í luftina við einari sjálvmorðsbumbu, siga myndugleikarnir. Tvær av gentunum eru tvíburðar.

Tær tríggjar genturnar skulu eisini hava havt ætlanir um at søkja at Mohammed, kongi og øðrum í marokkanska kongshúsinum, men ætlanin varð avdúkað, tá tann triðja gentan valdi at greiða frá, hvat tær ætlaðu at gera. Síðani er komið fram, at genturnar høvdu spurt seg fyri hjá einum muslimskum presti, um sjálvmorðsatsóknir eru í samsvari við muslimsku trúnna, men at presturin hevði sagt, at so er ikki.

Sambært løgregluni vórðu tær tríggjar genturnar tiknar bert fáar dagar, áðrenn tær ætlaðu at søkja at einum vínhandli í Rabat. Tvíburðasystrarnar skulu hava játtað seg sekar, men tann triðja gentan sigur seg vera óseka, skrivar AFP.

## Fáa ikki meiri sjálvræði

Baskararnir har norðuri í Spania vilja hava uppaftur størri sjálvræði, enn teir hava, men myndugleikarnir í Madrid ætla sær ikki at gera eftir kravinum.

Formaðurin í baskisku stjórnini, Juan José Ibaretxe, kunnaði fyri nøkrum døgum síðani tað baskiska tingið um eina ætlan, sum ber í sær, at Baskaralandið skal fáa eina støðu, sum meiri ella minni loysir landspartin frá hinum partinum av Spania. Eftir ætlanini skulu baskararnir sjálvir gera av, hvat samband teir vilja hava við myndugleikarnar í Madrid.

Men hetta verður av ongum, sigur spanski forsætisráðharrin, Jose Maria Aznar. Hann hevur svarað baskiska stjórnarformanninum, at tað kemur ikki upp á tal at góðtaka baskisku ætlanina.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Við mær á odda

**Á landsfundinum hjá Labour bað Tony Blair, forsætisráðharri, floksfelagarnar um stuðul til at røkka einum stjórnarskeiði afturat. Tað eydnaðist, men spurningurin er, hvat veljararnir siga**

BRETLAND
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

At Tony Blair er ein framúrskarandi røðari, hevur hann langt síðani prógvað, og hann nýtti eisini øll síni evni, tá hann royndi at sannføra landsfundin hjá Labour um, at hansara politikkur er tann rætti, og at flokkurin kann røkka einum stjórnarskeiði afturat, fær hann, altso Blair sjálvur, ta neyðugu undirtøkuna.

Í seinastuni hava altsamt fleiri bretar funnist at forsætisráðharranum og politikki hansara. Hann verður lagdur undir at hava logið fyri fólkinum í sambandi við kríggið í Irak, og mong halda, at hann er ikki tann maðurin, sum tey valdu at stýra landinum. Júst hesi fingu nøkur orð í røðu hansara á landsfundinum.

- Eg veit, at eg eri tann sami, sum eg altíð havi verið. Eldri, sterkari og við fleiri royndum, men innast inni tað sama menniskjað við teirri somu trúnni sum fyrr. Og hetta er tann einasta leiðslan, sum eg kann bjóða tykkum, segði Blair í røðuni, sum í fleiri brotum var sera persónlig.

Lógvabrestirnir í fundarhølinum í Bournemouth vístu, at floksfelagarnir trúgva honum. Spurningurin er so, um veljararnir eisini gera tað. Fyrradagin vísti ein kanning, at 60 prosent av bretunum hava mist álitið á honum.




*-Eg eri tann sami, sum eg altíð havi verið, segði Tony Blair hjá landsfundinum hjá Labour*

# Vinmenn hjá Bush fáa væl burtur úr krígnum

**Nakrir vinnulívsmenn, sum eru vinmenn hjá George W. Bush, forseta og medarbeiðarum hansara, hava stovnað eitt felag, sum skal veita góð ráð í Irak**

USA
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

New Bridge Strategies skal millum annað ráðgeva feløgunum, sum royna at sleppa upp í part, nú Irak skal endurreisast, skrivar New York Times.

Stjóri í felagnum er Joe M. Allbaugh, sum stóð á odda fyri valstríðnum hjá George W. Bush upp undir forsetavalið í 2000. Í leiðsluni eru eisini Edward M. Rogers og Lanny Griffith, sum arbeiddu sum ráðgevar hjá George Bush eldra, tá hann var forseti.

Sambært New York Times hevur felagið eina heimasíðu, og har verður dentur lagdur á, at felagið hevur gott samband við forsetan, umsiting hansara og skyldfólk hansara.

Fyrr hava amerikonsku myndugleikarnir kannað sambandið millum Dick Cheney, varaforseta og felagið Halliburton, sum hevur fingið fleiri sáttmálar um arbeiði í Irak. Cheney var stjóri í Halliburton, til hann hjørdist varaforseti. Kanningin vísti, at varaforsetin hevur framvegis áhugamál í felagnum, og at hann fekk 1,4 millión krónur frá felagnum í 2001 og 1,1 millión krónur í fjør.



FØROYA LANDSSTÝRI
**FISKIMÁLARÁÐIÐ**
AÐALSKRIVSTOVAN

## Teldufrøðingur til Fiskimálaráðið

Í Fiskimálaráðnum verður starvið sum teldufrøðingur hervið lýst leyst til setan skjótast gjørligt. Talan er um eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum uppgávum.

**Arbeiðið fevnir millum annað um**
Design, konfiguratión, uppsetan og ráðgeving í datasamskiftisloysnum hjá Fiskimálaráðnum. Harumframt fevnir arbeiðið um at samskipa eitt felags edvstev fyri Fiskimálaráðið, og at ráðgeva í tvørgangandi málum á Fiskimálaráðnum og til landsstýrismannin.

Tú ert ein strategiskur persónur, ið er vanur at taka avgerðir á hesum støði. Tú kemur at arbeiða í einum tvørfakligum umhvørvi, og kemur eisini at hava beinleiðis samskifti við uttanhýsis edv-veitarar.

**Førleikakrøv**
Tú hevur eina viðkomandi útbúgving so sum datalog, datamatikari, DØK, dataverkfrøðingur ella líknandi.

Royndir innan økið, og kunnleiki í design, konfiguratión, uppsetan og ráðgeving í datasamskiftisloysnum er ein fyrimunur. Talan er um eitt tvørfakligt umhvørvi, og tí er tað týdningarmikið, at viðkomandi er fleksibul, tekur initiativ, er samstarvsfúsur og arbeiðir sjálvstøðugt.

**Setanartreytir:**
Løn- og setanarviðurskifti eru sambært avtalu millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmannsskrivstovuna. Tænastustaðurin er í løtuni Aðalskrivstovan.

Tann, ið settur verður, hevur beinleiðis tilvísing til aðalstjóran. Tann, ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir, saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum, skulu vera Fiskimálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin 6. oktober 2003 kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Fiskimálaráðið, Postsmoga 347, 110 Tórshavn**

Upplýsingar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Fiskimálaráðið á tlf. 353030 og tosa við Jørmann Petersen, deildarleiðara.




## Eftirlýsing eftir myndum til myndaframsýning á Ráðstevnuni tann 10. - 11. oktober 2003



Vit sóknast eftir myndum, Nýggjum sum gomlum, ið lýsa Heilsuverkið í Føroyum!

Alt hevur áhuga!

Myndirnar skulu sendast til:

Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar
Att.: Søgubólkurin · Lucas Debesargøta 14
Postsmoga 1285 · 110 Tórshavn

Sosialurin 341800



Skeiðsdepilin
FØROYA HANDILSSKÚLI TEKNISKI SKÚLIN

### KUNNINGARFUNDUR

Nýggj leiðsluútbúgving
**"Grundleggjandi leiðaraútbúgving"**

Kunningarfundur verður mikudagin 8. oktober 2003 kl. 16.00 á Føroya Handilsskúla

Nýggja útbúgvingin byrjar 27. oktober. Skift verður millum stutt útbúgvingarmodul í alt 5 ferðir, sum vara 2-3 dagar hvørt, fram til 3. februar 2004. Talan er um eina útbúgving, sum leggur dent á praktiskar og brúksrættaðar leiðsluførleikar.

Grundleggjandi leiðaraútbúgvingin er væl kend, eitt nú í Danmark, har fleiri av handilsskúlunum bjóða hesa útbúgving út. Útbúgvingin er praktisk og setir ikki serlig krøv til útbúgving fyri at verða upptikin.

**Meira um útbúgvingina er á: www.skeidsdepilin.fo**

team 85 • 35800

Marknagilsvegur 77, Postrúm 177, 110 Tórshavn
Tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo